LM-099/2023

Annika Petersen

Fylgiskjal 27

Fra: Fía Selma Nielsen <fiaselma85@gmail.com>
Sendt: 21. februar 2024 19:32
Til: VMR-Journal
Emne: Hoyringsskriv viðvíkjandi uppskotið um nýggja ferðavinnulóg

Hey rætti viðkomandi,

Í 2008 keypti eg mær 6 gyllin í Dalhaga í Sandavági. Tí eg altíð havi verið náttúrumenniskja ynskti eg møguleikan at fara í hagan tá mær lysti, hetta var ein av høvuðsorsøkunum til at eg keypti jørðina.

Mítt matr. nr. 83a hevur onga innangarðsjørð og tí má prísurin sum eg keypti tað fyri metast sum tað, sum eg havi goldið fyri at hava møguleikan at fara í hagan tá eg havi hug til tað.

Verður lógaruppskotið um nýggja ferðavinnulóg samtykt í verandi líki fáa øll somu rættindi sum eg í haganum og tí meti eg at tað virðið sum mítt matr. nr. hevur í dag fer at fella í virði um hetta verður veruleiki.

Tí vil eg staðiliga mótmæla ætlanirnar um at strika verandi reglur um hegn og markafrið.

Blíðar heilsanir

Fía Selma Nielsen